**Samstarv við POLITIKEN**
Sosialurin samstarvar við danska blaðið, Politiken. Niðanfyri er brot úr grein, sum stóð í blaðnum í samband við danska valið. Kanska viðkomandi nú løgtingsvalið nærkast

# Materialisman hevur sigrað

**Í seks ár hevur VK-stjórnin sett dagsskránna í danska virðiskjakinum. Samstundis eru danir vorðnir ríkari og ríkari. Men hvat hevur Fogh stjórnin flutt? Materialisman – og bilseljarar og køkssølumenn – síggja út til at vera stóru vinnarnir í borgarliga virðisbardaganum**

*Carsten Andersen*
*Tekning: Roald Als*






Virðiskjak snýr seg ikki bara um virðir og hugburð, men eisini um pengar. Og flestu viðmerkjarar eru samdir um, at materialisman er vinnarin í tí virðiskjaki, sum VK stjórnin fleiri ferðir hevur sett á dagsskránna.

Sambært Frederik Preisler frá lýsingarfyritøkuni Propaganda er tosið um virðiskjak ongantíð vorðið til meira enn eitt frívirðis-kjak.

- Henda stjórnin roknar virðir sum nakað, sum fíggjarmálaráðharrin kann rokna seg fram til. Tað snýr seg altíð um pengar, sigur hann.

- Okkara hugburður hevur broytt seg. Vit hava ongantíð verið materielt so væl fyri og ongantíð mentalt so avmergjaði sum nú. Grundliggjandi haldi eg, at hendan stjórnin tey seinastu seks árini hevur mutrað okkum øll við skattastegði og frívirðum. Í Borgargøtu í Keypmannahavn lá í mong ár ein stórur, vakur handil, har mann kundi keypa sær klaver. Í dag kanst tú keypa tær køk í hesum handli. Hetta lýsir væl tíðarandan, haldi eg. Tað hevur størri virði at koma frá einum heimi við einum lekrum køki enn tað er at koma frá einum heimi við klaver, sigur Frederik Preisler.

### Smáborgarlig handilsvirðir

Claus Kastholm Hansen, viðmerkjari í Berlingske Tidende, heldur eisini, at búskaparliga framgongdin hevur sett týðulig spor eftir seg í danska samfelagnum og í danskari virðismeting.

- Øll hugsa um, hvussu tey sjálvi hava tað, og hvat tey sjálvi eiga og hava. Økta materialisman og eyðmerkta moralisman og trongskygni eru eitt týðuligt virðisskifti, har tey smáborgarligu virðini hava sigrað, staðfestir hann.

Jørgen Carlsen, forstandari á Testrup háskúlanum, býtur serliga merki í, at virðispolitikkurin ikki býtir politisku flokkarnir upp í vinstra og høgra, tí materialistisku virðini røkka langt inn í javnaðarflokkin.

- Ikki tí eg eri ímóti, at vit hugsa um búskapin, men tað er nú hugstoytt, at eitt av heimsins ríkastu londum hava sum yvirskipað mál at gerast enn ríkari. Kjakið um altjóðagerð hevur bara snúð seg um búskap, búskap og búskap. Vit eru einans upptikin av, hvat vit skulu liva av, og ikki hvat vit liva fyri. Men neoliberalisman sleppur jú lætt um tann spurningin við at siga, at tað mugu vit sjálvi um, sigur Jørgen Carlsen.

### Horvni felagshuðurin

Hanne Reintoft, rithøvundur og samfelagskjakari, heldur, at borgarliga virðisstríðið hevur eydnast. Tað er ikki longur nakað, sum eitur "fælleskab, kollektivitet og solidaritet."

- Vit dyrka øll okkara egna lívsprojekt. Tú skalt vera tín egna succes.

At perspektivið í virðiskjakinum er smalkað, er hon ikki einsamøll um at halda. Frederik Preisler tosar um trý løg, sum fyrr vóru í kjakinum. Tað tætt við: Virum Torv. Tað regionala: Danmark og Europa, og síðani eisini tað globala. Nú er bara Virum Torv eftir, sigur hann.

Samskiftissráðgevin, Henrik Byager, er samdur.

- Tað snýr seg um míni børn, mína sjúku og mína gamlu mammu. Vit tosa ikki um kríggið í Irak ella ES.

Spurningurin er, um virðiskjakið er broytt so nógv, at tað ikki vendist aftur. Sambært Frederik Preisler hevur materialisman sigrað seg í hel.

- Vit eru í ferð við at fáa materielt forstoppilsi, sum vónandi endar við einari frígevandi diarré, har alt kemur út, sigur hann.

*Týtt: Dorit Hansen*

**Tíðargreinin**

## … Javni ella framburður? Rættvísi ella effektivitetur?

beinleiðis ein vælferðar-øking hjá suðuroyingum, tí at fleiri stabilir arbeiðs-møguleikar verða í tænastu-geiranum – bæði tí almenna og privata.

Men eisini ein undirsjóvartunnil til Sandoyar er ein vælferðarøking. Um ikki fjallið kann koma til Mohammed, so má Mohammed koma til fjallið. Í staðin fyri at flyta arbeiðs-pláss til Sandoyar, verður Sandoyggin í staðin knýtt at føroyska "meginlandsbýnum", soleiðis at sandoyingar í størri mun kunnu taka arbeiði og eftirspyrja tænastur í (serliga) Tórshavn. Ein tunnil til Sandoyar er ein risastór vælferðar-øking, ið kompenserar fyri vantandi almennu arbeiðs-plássini í oynni.

### Tað almenna skapar ójavnað

Mesta almenna arbeiðs-megin eru í dag miðsavnað í Streymoynni (2006). Her búgva umleið 11.900 arbeiðandi fólk, og av hesum arbeiða umleið 4.600 (38,5 %) innanfyri almenna fyrisiting og tænastur. Í restini av landinum eru umleið 13.400 arbeiðandi fólk, og her arbeiða umleið 3.700 fólk (28 %) innanfyri almenna fyrisiting og tænastur. Millum annað í Suðuroy og Sandoy eru fá fólk innanfyri tað almenna. Í Suðuroynni arbeiða 670 (28,5 %) av teimum knapt 2400 arbeiðandi fólkunum innanfyri tað almenna, og í Sandoynni arbeiða 190 (27 %) av teimum 800 arbeiðandi fólkunum innanfyri tað almenna. Harvið er tað almenna beinleiðis við til at økja um ójavnvágina millum økini. Streymoyggin fær meiri, meðan veik øki fáa minni.

Um Sandoy hevði líka nógv fólk í almennum starvi sum Streymoy, so hevði Sandoy fingið 21 miljónir meiri í skjáttuna av stabilum, skattafíggjaðum lønar-krónum – 70 miljónir heldur enn 49 miljónir. Um hinvegin Streymoy skuldi havt líka fá fólk í almennum starvi sum Sandoy, skuldi føroya største oyggj av við umleið 360 miljónir – 830 miljónir heldur enn 1,19 miljardir! Hetta út frá tí fyritreyt, at alment sett í meðal vinna umleið 258.000,- árliga (2006).

Staðfestast má sostatt, at í dag er tað almenna ikki nakað kupp fyri veiku økini í landinum, heldur tvørturímóti. Tí má tað síggjast sum rættvíst, tá íløgur sum Sandoyartunnilin og nýggi Smyril verða framdar. Hesar íløgur eru við til at minka um tann ójavna, ið tað almenna annars fremur.

### Tað almenna og tað modernaða

Trupulleikin er bara, at tað almenna ikki einans hevur eina uppgávu at tryggja javnvág í samfelagnum – ella við øðrum orðum orðum at tryggja samfelagið út frá verandi bygnaðum. Tað almenna hevur eisini sum uppgávu at skapa ein framburð í samfelagnum. Ofta vilja javna-hugsjónin og framburðs-hugsjónin hanga saman, men aðrar tíðir vilja tær koma í andstøðu hvør við aðra. Hetta síðsta er galdandi í Føroyum í dag, tí í dag eru Føroyar sum heild vorðnar ein útjaðari, ið krevur framburð fyri ikki at gerast eftirbátur. Og hvussu skal evropeiski útjaðarin Føroyar hava ráð til eisini at hjúkla um sín egna ytra útjaðara, tá tað illa megnar at fylgja við sum heild? Skulu Føroyum vera lív lagað sum globalt og modernað samfelag, so er neyðugt at nýggjastu samferðslu- og samskiftishentleikarnir úteftir verða útbygdir, soleiðis at skaðiligir fløsku-hálsar ikki íkoma.

Tí er tað millum annað sera relevant at spyrja seg sjálvan: Er tað rættari at gera íløgur í innlendis infra-kervið, ella er tað rættari fyrst at hugsa um infra-kervið út í heim, ið er ein beinleiðis fyritreyt fyri at Føroyar kunnu vera ein samansjóðaður partur av alheimssamfelagnum? Her verður serliga hugsað um íløgur sum fjarskiftis-kaðalar og altjóða flogvallir.

Kanska áttu føroyingar at tikið eina avgerð um, at einans tey økini, ið longu nú hava fast samband við hvørt annað, eiga framhaldandi at verða moderniserað, meðan øll onnur øki eiga at sleppast upp á fjall. Tað er sjálvandi himmalrópandi órættvíst, men ótespiligi spurningurin er hvat "útjaðarin Føroyar" hevur ráð til í hørðu kappingini við útheimin. Onkursvegna er neyðugt at skapa eina javnvág millum javnað og framburð – millum rættvísi og effektivitet.